Skjal 12

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
L. Debesargøta 14 • Postboks 1285
FO-110 Tórshavn • Faroe Islands

Almannaráðið

Tórshavn tann 14. september 2018

**Viðmerkingar til "Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m."**

Tað er at fegnast um, at lógin verður endurskoðað soleiðis at borgarin til eina og hvørja tíð veit hvørja tænastu hann hevur rætt til og hvør skal veita tænastuna. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er av tí áskoðan, at tá man endurskoðar lógina eru fleiri ting, ið eiga at verða tikin við.

Eitt av berandi argumentunum fyri lógarbroytingini er, at ábyrgdarhavandi mynduleiki hevur neyðugar førleikar til at veita tænastuna.

Ført verður fram, at kommunurnar við yvirtøkuna av eldraøkinum hava fingið øll tey starvsfólk, sum hava førleikar at veita røkt.

Sjálvt um hetta er berandi argumentið fyri, hvørja ábyrgd kommunurnar skulu hava, er onki í lógini sum tryggjar borgaranum dygdina av røktini.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur fleiri ferðir víst á henda trupuleika og fer tí at heita landsins mynduleikar um at gera neyðugar broytingarnar og áseta neyðug krøv í lógini fyri at tryggja borgaranum dygdarrøkt.

Støðan í dag er, at kommunurnar halda, at ein og hvør kann leiða røktina í kommununum. Hetta er at undrast yvir. Røkt av okkara eldru borgarum er eitt serøki, sum krevur fakliga servitan bæði innan raðfesting og hvussu røktin skal veitast. Sjúkrarøktarfrøðingar er einasti fakbólkur, sum er útbúgvin til at leiða og raðfesta røkt.

Gongdin, sum vit longu nú síggja er, at ávís økir í landinum ikki megna at halda fast í sjúkrarøktarfrøðingunum, sum eru best útbúnu starvsfólk, og hetta kemur sjávsagt at ávirka tænastuna, sum borgarin fær.

Eisini síggja vit longu nú, aftaná bert 3 ár har kommununar hava havt ábyrgdina av eldarøkinum, at tilboðini til borgaran ógvuliga ymisk í kommunalu samstarvsøkjunum. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er av tí áskoðan, at allir borgarar í Føroyum hava rætt til dygdartænastu á ellisárum, og at landsins mynduleikar hava ábyrgd av at tryggja teimum hesa dygdartænastu.

Um man ikki er sinnaður at lóggeva leiðsluna av eldraøkinum hægsta fakliga støði sum er, nemliga at sjúkrarøktarfrøðingar sjálvsagt leiða sjúkrarøkt, so er neðugt at lóggeva at øll økir, sum minimum, seta sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava evstu fakligu ábyrgdina.